UTTAN ÚR HEIMI

## Fimta hvørt fólk kann doyggja

Vandi er fyri, at umleið fimta hvørt fólk í Ethiopia fara at doyggja í hungri, fáa tey ikki hjálp sum skjótast.

Tilbúgvingarnevndin í landinum sigur, at talið á teimum, sum tørva mat, veksur skjótt, og sum er hava 12,6 milliónir fólk tørv á at fáa matvøruhjálp. Fáa tey ikki tað, er vandi fyri, at øll fara at doyggja í hungri, sigur nevndin. Tað svarar til, at fimta hvørt fólk í Ethiopia kunnu líða hungursdeyðan.

Sambært tilbúgvingarnevndini er tørvur á 944.000 tonsum av mati til at nøkta tørvin teir næstu seks mánaðarnar, men enn hava lond bert lovað at lata 600.000 tons, sigur talsmaðurin hjá nevndini.

## Kanska tvey ár í Irak

Tað fara kanska at ganga tvey ár, áðrenn USA fer at taka sínar hermenn úr Irak.

Tað sigur George W. Bush, forseti. Hann sigur, at amerikanararnir eru lidnir við kríggið í Afghanistan, men at kríggið í Irak er ikki liðugt enn. Hann heldur, at tað kann taka tvey ár at fullføra uppgávuna har. Millum annað skulu hermenninir leita eftir hópoyðingarvápnum, tí forsetin sigur seg vera sannførdan um, at Irak hevði tílík vápn, sjálvt um amerikanskir talsmenn hava roynt at benda tosinum frá hópoyðingarvápnunum í seinastuni.

- Tað avgerandi er, at Saddam Hussein kann ikki hótta USA við hópoyðingarvápnum longur, sigur Bush.

## Skuldsettur fyri morð

Løgreglan í Serbia leggur nú fyrrverandi forsetan, Slobodan Milosevic, undir at hava verið uppií, tá ein annar fyrrverandi serbiskur forseti, Ivan Stambolic, varð burturfluttur og myrdur. Tíðindastovan Beta skrivar, at átta onnur fólk eru undir illgruna í sama máli. Teirra millum er fyrrverandi ovastin í trygdartænastuni, Radomir Markovic.

Ivan Stambolic varð burturfluttur í einari viðalund í Beograd í august í 2000, stutt áðrenn Milosevic varð koyrdur frá. Í síðsta mánað varð líkið funnið í einum námi har norðuri í Serbia.

Serbisku myndugleikarnir hava fyrr sagt, at kona Milosevic, Mira Markovic, var eftir øllum at døma uppi í burðurflytingini og morðinum, men hon er ikki skuldsett enn. Mira Markovic fór úr Beograd fyrr í ár og hevur síðani verið hjá soninum, sum býr í Moskva.

## Skjeyt ikki tyrluna

Irakski bóndin Ali Abid Minqash gjørdist kendur um allan heimin, tá irakska sjónvarpið vísti myndir av honum og einari amerikanskari tyrlu, sum bóndin sambært sjónvarpinum hevði skotið niður við einari gamlari byrsu. Bóndin varð róstur sum hetja og sum ímyndin av irakskum stríðsvilja.

Men søgan var íspunnin. Tað var rætt, at tann amerikanska tyrlan var skotin niður, men tað var ikki bóndin, sum hevði rakt hana. Við eitt kuwaitiskt blað sigur Ali Abid Minqash, at tá hann kom fram á tyrluna, boðaði hann skrivstovuni hjá Bath-flokkinum frá tí, sum hann hevði sæð. Nakrir menn komu við honum og søgdu honum, at hetta var ein amerikansk Apache-tyrla.

- Teir bóðu meg siga, at tað var eg, sum hevði skotið tylruna niður við mínari gomlu byrsu, sigur bóndin við kuwaitiska blaðið.

# Norðurkorea viðgongur at hava kjarnorkuvápn

**Undir samráðingunum við amerikanararnar skala Norðurkorea hava játtað, at landið hevur kjarnorkuvápn. Fyrsta samráðingarumfarið endaði í gjár, og tá var langt millum partarnar.**

NORÐURKOREA
*Árni Joensen*



*Amerikanski samráðingarleiðarin James Kelly á veg úr beijing aftan á fundin við norðurkoreanar*

- Jú, vit hava kjarnorkuvápn, og hvat ætla tit at gera við tað?

Tað var svarið, amerikanski samráðingarleiðarin, James Kelly, fekk, tá hann spurdi norðurkoreanska samráðingarleiðaran, Li Gun, um Norðurkorea hevur kjarnorkuvápn ella ikki.

Svarið sigur ikki so lítið um tónan í samráðingunum, men sambært amerikanska varauttanríkisráðharranum, Richard A. Boucher, kom svarið ikki óvart á amerikansku samráðingarmenninar. Boucher sigur, at amerikanska stjórnin hevur leingi kent seg fullvísa í, at norðurkoreanar hava kjarnorkuvápn. Ein av amerikansku samráðingarmonnunum sigur, at norðurkoreanar viðgingu eisini, at landið umhugsar at royna kjarnorkuvápnini.

Amerikanarar halda, at Norðurkorea ætlar sær at nýta kjarnorkuvápnini til at trýsta USA til at veita landinum búskaparliga hjálp, men Colin Powell, uttanríkisráðharri segði í gjár, at hesum fáa norðurkoreanar einki burturúr.

Kina var umboðað í samráðingunum, sum vóru í Beijing, og amerikanarar ætla, at Suðurkorea og Japan skulu taka lut í næsta samráðingarumfari, tá tað verður, ella um tað verður, sum Colin Powell orðførdi seg í gjár.

# Tubbaksfyritøka sýtir fyri at rinda endurgjald

**Stóra amerikanska tubbaksfyritøkan Philip Morris er dømd at rinda roykjarum risastórt endurgjald, men fyritøkan leggur nú dómin fyri hægri rætt.**

ROYKING
*Árni Joensen*

Philip Morris bað í gjár dómaran Nicholas Byron í statinum Illinois broyta dómin, sum krevur, at fyritøkan skal rinda fólki, sum hava fingið skaða av roykjing, endurgjald. Í øðrum lagi krevur fyritøkan, at endurgjaldið verður lækkað.

Í rættinum varð fyritøkan dømd at rinda saksøkjarunum góðar 50 milliardir krónur í endurgjaldi og myndugleikunum aðrar 20 milliardir krónur í bót.

Í úrskurðinum segði rætturin, at tað var villleiðandi, tá fyritøkan setti orðið "light" uttan á sigarettpakkarnar, tí tað fekk roykjararnar at halda, at hesar sigarettirnar eru minni heilsuskaðiligar enn aðrar sigarettir. Philip Morris vil ikki góðtaka hesa áskoðanina.

Tað er ikki bara í Illinois, at Philip Morris er dømt at rinda endurgjald. Fyritøkan hevur fingið tilsvarandi dóm í Florida og Kalifornia.

# Tariq Aziz tikin

**Fyrrverandi irakski varaforsætisráðharrin og uttanríkisráðharrin, Tariq Aziz, situr nú í varðhaldi hjá amerikanarunum.**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen*

Uppaftur ein av fyrrverandi iraksku leiðarunum situr nú í amerikanskum varðhaldi.

Hesaferð snýr tað seg um fyrrverandi varaforsætisráðharran, Tariq Aziz, sum eisini hevur verið irakskur uttanríkisráðharri. Tað er ikki heilt greitt, um hann varð tikin, ella um hann gav seg yvir sjálvboðin.

Tann 66 ára gamli Aziz var ofta talsmaður hjá stýrinum í Bagdad, og uttanlands varð hann mettur at vera ein dugnaligur diplomatur. Hann er tann einasti av fyrrverandi iraksku leiðarunum, sum er kristin.

Amerikanarar halda ikki, at Tariq Aziz hevur havt stóra ávirkan á stýrið hjá Saddam Hussein tey seinastu árini.



*Tariq Aziz situr nú í amerikanskum varðhaldi*





*Clickhaze var favorittur í 2001 og vann eisini finaluna. Í ár er fyrstu ferð ongin favorittur at vinna finaluna, sigur ein av Prix-dómarunum*

Prixdómari:

# Dømingin verður torførari enn nakrantíð

**- Tað ber ikki til at útpeika ein ella tveir bólkar út sum favorittar til at vinna finaluna, og tað er ikki hent fyrr í einari Prix Føroyar finalu, so eg vænti at dømingin verður torførari enn nakrantíð fyrr, sigur ein av føroysku dómarunum til Prix finaluna í kvøld**

PRIX FØROYAR
*Rúnar Reistrup*

- Braquet er kanska einasti bólkur, sum kann metast sum veruligur outsidari í finaluni. Annars er ringt at taka dagar ímillum. Hatespeech eru væl fyri, MC-Hár kunnu yvirraska, og tað ljóðar, at Déjá Vu hava fingið nakrar áhugaverdar sangarar afturat sær, sum kunnu gera ein mun, so tað verður øgiliga spennandi, sigur ein av teimum føroysku dómarunum til Prix finaluna í kvøld, sum Sosialurin fekk orðið á.

Av tí at Prix Føroyar fyrireikararnir hava valt at halda nøvnini á Prix dómarunum loynilig, nevna vit ikki navnið hesum á dómara.

### Púra opin finala

Sambært dómaranum, sum hevur roynt at verið dómari í Prix finalum áður, verður uppgávan í kvøld uttan iva tann torførasta nakrantíð hjá Prix dómarunum.

- Higartil hevur tað altíð verið onkur rímiliga klárur favorittur undan finaluni, og hesin favorittur hevur vunnið. Men soleiðis er ikki hesuferð. Her er eingin klárur favorittur. Tí er kappingin púra opin, sigur dómarin, sum hóast hann hevur størri vónir til nakrar bólkar enn aðrar, fer til finaluna við púra opnum oyrum og sinni.

- Tað skyldar man bólkunum, tí teir hava allir havt tíð til at arbeitt nógv við tónleikinum síðan undanumførini. So hóast eg longu havi sæð og hoyrt allar bólkarnar, so viski eg talvuna reina, áðrenn finaluna, sigur dómarin.

### Vinnarin skal klára seg uttanlands

Í fyrra dømingarumfari verður dømt sum vanligt eftir einum føstum dømingarfrymli, men í seinna dømingarumfari, har eisini almenningurin sleppur framat at døma, skal hvør dómarari bert velja ein bólk út millum teir tríggjar, sum verða útvaldir í fyrra dømingarumfari.

- Í seinna dømingarumfari vænti eg, at eg fari at umhugsa støðuna heilt av nýggjum. Avgerðina fari eg so at taka útfrá hvussu tónleikararnir tykjast at trívast saman á pallinum og hvør hevur tað, sum skal til, fyri at klára seg uttan fyri Føroyar eisini, sigur dómarin.

### Gott við fólksins dómi

Seinnu árini hava dómararnir verið einaráðandi, men nú verða fólk kring alt landið eisini tikin upp á ráð, tá vinnarin skal kjósast. Tað dámar hesum dómaranum væl.

- Eg haldi tað vera fínt, at vanligi føroyingurin fær part í avgerðini. Hvat fólk halda um bólkarnar er áhugavert, um man vil finna ein vinnara, sum megnar at gera vart við seg uttanlands. Men eg vóni bara, at fólk minnast til, at hetta er ein tónleikakapping og ikki fara at døma útfrá lokalum ella átrúnaðarligum bondum, tí tað gevur onga meining, sigur prixdómarin, sum í kvøld fer at lurta væl eftir hvørjum tóna, ið kemur út ígjøgnum ljóðanleggið í Norðurlandahúsinum.

## Hvussu skal eg atkvøða?

Fyri fyrstu ferð í 8 ára langu Prix Føroyar søguni verða sjónvarpshyggjarar og útvarpslurtarar kring alt landið tiknir upp á ráð, tá ein vinnari skal kjósast í kvøld. Men hvussu skal man so atkvøða? Vit hava biðið nakrar av luttakarunum um ráð.

MC-Hár:

### Vel tann tónleik, sum kemur tær við

- *Tónleikurin* er tað mest umráðandi i *tónleikakappingini* Prix Føroyum, og tí eigur tú fyrst og fremst at taka støðu útfrá tí *tónleiki*, sum bólkarnir spæla, heldur Jónas Bloch Danielsen, annar av gittarleikarunum í MC-Hár.

- Og minnst til at tónar kunnu ikki vera lokalpatriotiskir. Um tær til dømis ikki dámar gøtumenn, men tónleikurin hjá einum bólki úr Gøtu rørir nakað í tær, so vel hann kortini. Lurta uttan fordómar, ver opin fyri øllum, og vel síðan tann tónleikin, sum kemur tær við, sigur gittarleikarin.

- Og um tú ert í iva, so kanst tú altíð atkvøða fyri MC-Hár, tí MC-Hár elskar jú øll, eru seinastu ráðini frá Jónas Bloch Danielsen úr MC-Hár.

Gestir:

### Royn at vera opin og objektiv

- Tað skal helst liggja ein meting og ein avgerð aftanfyri dømingina, annars gevur tað ikki rættiliga meining at døma. Um tú av tilvild kennir bassspælaran í einum av bólkunum, so eigur tað ikki at vera nokk, til at bólkurin fær tína atkvøðu, heldur Knút Eysturstein, ljómborðsleikari í Gestum.

- Royn og ver so opin og objektiv, sum til ber, lurta eftir tónleikinum, legg merki til løgini og samanspælið, og atkvøð síðan fyri tí bólkinum, sum segði tær mest, eru ráðini frá Knúti Eysturstein úr Gestum.

Déjá Vu:

### Atkvøð bara fyri tí tú vilt

- Tú skalt royna at vera so objektiv sum møguligt og ikki bara atkvøða fyri tínum vinum ella systkinabørnum. Og so hinvegin. Kann man lata vera? Eg haldi, at tað slepst nokk ikki undan at vinar- og familjubond fara at ávirka nógvar hyggjaraatkvøður. Um man hevur vinarbond til ein bólk, heldur man kanska automatiskt at tann bólkurin er betri enn hann í veruleikanum er. Eg kann í hvussu er gott fyristilla mær, at eg hevði latið meg ávirkað um so var. So atkvøð bara fyri tí tú vilt, eru ráðini frá Líggjasi Olsen, sangara og ljómborðsleikara í Déjá Vu

# Spor – keramikk-framsýning

*Heri á Rógvi*

Leygardagin letur Guðrið Poulsen upp eina framsýning í Listaskálanum. Talan er um eina framsýning við seinastu verkunum hjá listakvinnuni úr leiri. Framsýningin hevur fingið heitið Spor.

Í mentanartíðundunum hjá Sjónvarpi Føroya greiddi Guðrið Poulsen frá, at hevur nýtt ymsar lívrunnar verur í havinum sum inspiratión, har tað eisini síggjast spor eftir menniskjum.

Framsýningin letur upp kl. 16 leygardagin í Listaskálanum, og framsýningin verður at síggja til 18. mai.



*Nýggjastu verkini hjá Guðrið Poulsen verða at síggja í Listaskálanum til 18. mai.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*